## Diabetes-felag Føroya fingið stórfingna gávu

**Kiwanis í Føroyum hevur givið felagnum stóra gávu til barnaarbeiði, og gávan varð handað á jólaveitsluni fyri børnunum**

BARNAARBEIÐI

Tá Diabetesfelag Føroya hin 3. dec. í ár helt jólaveitslu fyri børnum við diabetes, fingu vit eina sjáldsama vitjan.

Saman við jólamanninum komu tveir mans spákandi oman ímóti MBF-húsinum, har veitslan varð hildin, og ímillum sín høvdu teir ein stóran, flatan pakka. Børnini vóru júst farin at dansa um jólatræið, og tá íð menninir komu inn og spurdu børnini, um tey vildu hava eina serliga jólagávu, stóðu tey sum kánus. Jú, hvør vil ikki fáa eina serliga jólagávu!

Pakkin var pakkaður út, og fram kom ein kekkur uppá 30.000 kr, sum hesir báðir, Zakarias Reinert Jacobsen, formaður í Kiwanis saman við Hera Østerø Simonsen, nevndarlimi handaðu formanni felagsins. Øll vóru sera glað fyri hesa stórfingnu gávu, men glaðast vóru børnini, sum longu tá tosaðu um, hvar vit skuldu fara í summarlegu komandi summar, og tey vildu øll sleppa at nema við henda stóra kekk.

Diabetesfelag Føroya skipar hvørt ár fyri ymiskum tiltøkum fyri børnum við diabetes, systkjum teirra og foreldrum og øðrum avvarðandi. Vanliga verður skipað fyri eini summarlegu, har serlig fakfólk eru við og undirvísa bæði børnum, foreldrum og avvarðandi. Hetta serliga tiltak er kostnaðarmikið, og tí kemur gávan frá Kiwanis sera væl við.

Vit vilja við hesum siga Kiwanis í Føroyum stóra tøkk fyri hesa gávu.



*Savnið er myrkt uttan og ljóst innan*

# Listasavnið á Sandi er handað

**Listasavnið á Sandi er liðugt og eigarin Sofus Olsen hevur yvirtikið savnið, ið borgarstjórin á Sandi Páll á Reynatúgvu kallaði eina stóra gávu til sandoyingar og allar føroyingar**

LISTASAVN Á SANDI

Á lítlari samkomu leygardagin, handaði Articon Sofusi Olsen lidna Listasavnið á Sandi. Fyritøkan fór undir arbeiðið at byggja Listasavnið í august mánaða í ár, og fyri góðari viku síðan stóð savnið liðugt.

Familja og vinir hjá Sofusi umframt borgarstjóran á Sandi vóru savnaði á samkomuni í morgun, og øll tyktust samd um, at hetta er eini frálík hús. Savnið stendur væl til gomlu grannahúsini, ið eru barndómsheimið hjá Sofusi Olsen.

Sofus Olsen hevur arbeitt við hesið ætlanini seinastu fimm árini. Arkitekturin J.P. Gregoriussen hevur tekna savnið og Articon hevur tikið sær av allari bygginini. Bæði Sofus Olsen og J.P. Gregoriussen vóru væl nøgdir við arbeiðið hjá Articon.



*Einki innbúgv var í húsinum, tí var trappan karmur um undirskrivingina*

Á samkomuni segði Jón Danielsen frá Articon, at hann var glaður fyri at sleppa at luttaka í einin tílíkari verkætlan, sum bæði var forkunnug og stuttligt.

Á savninum fara myndir, ið Sofus hevur keypt yvir nærum 50 ár, at hanga. Húsini hava nógvar metrar av útstillingarveggi so pláss skuldi verið fyri teimum nógvu málningunum av listarfólki sum Ingálvi av Reyni, Samuel Joensen Mikines, Poul Horsdal, Elinborg Lützen, Jack Kampmann og Frimod Joensen bert fyri at nevna nøkur fá av teimum mongu.

Savnið hevur uppiborðið at verða sýnt fram í góðum karmum, og teir karmarnir veita nýggju húsini.

Sofus hevur sjálvur allan kostnaðin fyri byggingina av húsinum, hetta er ein upphædd millum hálva aðru og tvær milliónir.

Sands kommuna hevur játtað at rinda helvtina av mvg'num, og Mentamálaráðið hevur, um rúm verður fyri tí á fíggjarætlanini fyri 2006, játtað at rinda hina helvtina.

Borgarstjórin á Sandi Páll á Reynatúgvu takkaði Sofusi fyri hesa ósjálvsøknu gerð, og helt at hetta var ein stór gáva og gleði fyri bygdaráðið á Sandi, sandoyingar og fyri allar føroyingar.

Enn er ikki avgjørt, nær savnið letur upp.



*Nýggja listasavnið stendur væl til gomlu grannahúsini, ið eru barndómsheimið hjá Sofusi*